# Leiðbeining til brúkaran av bussinum hjá Serflutningsskipan Landsins í Tórshavnar kommunu

Endamálið við Serflutningsskipan Landsins er at veita flutningsmøguleika til fólk, ið bera brek og eru bundin av koyristóli og eru so tarnað, at tey ikki kunnu nýta almenn flutningstól, ella í avmarkaða tíð hava hendan tørv. Skipanin fevnir ikki sjúkraflutning.

Soleiðis verður søkt um loyvi at koyra við bussinum hjá Serflutningsskipanini:

1. Umsóknarblað fæst við at venda sær til Heilsu- og umsorganartænastuna í Tórshavnar kommunu, tlf. 302000 ella á heimasíðuni torshavn.fo

2. Heilsu- og umsorganartænastan hjá Tórshavnar kommunu, góðkennir og tekur avgerð um serflutningur kann játtast.

3. Har tað er neyðugt, kann brúkarin taka hjálparfólk við ókeypis.

4. Bussurin hevur støð á sløkkiliðstøðini tlf. 302100. Bilførarnir koyra og hjálpa fólki, ið sita klár innan fyri úthurðina, í og úr bussinum. Um trappa er, er neyðugt við hjálpartóli, sum lyfta ella rampa, hetta fæst við at venda sær til Hjálpartólamiðstøðina

5. Bussurin koyrir í vanligari arbeiðstíð frá kl. 9.00 til kl. 16.00 allar yrkadagar

6. Busskoyringin er ókeypis.

7. Um kvøldið og í vikuskiftinum er møguleiki at nýta bussin sum hýruvogn. Gjaldið fyri hesar túrar er sum fyri vanligan hýruvogn. Túrar uttanfyri arbeiðstíð skulu verða bílagdir áðrenn kl. 16.00 og til vikuskifti áðrenn 15.30 fríggjadag.

8. Rørslutarnað úr aðrari kommunu, ið eru góðkendir brúkarar og sum eru stødd í Tórshavnar kommunu, kunnu nýta bussin hjá Serflutningsskipanini í Tórshavn.

Tey, ið ynskja aðrar upplýsingar um bussin, kunnu venda sær til Heilsu- og umsorganartænastuna í Tórshavnar kommunu, tlf. 302000.